

www.oljan.fo

**Jan Müller** 11 - 07 - 2013

# Klintra upp í hægsta bygning at mótmæla boring í Arktis

Seks kvinnur hava í morgun klintrað upp í hægsta bygningin í Europa, the Shard í London fyri at mótmæla oljuboringum hjá Shell í Arktis. Høvuðsskrivstovan hjá Shell finst beint í grannalagnum og vilja fólkini hjá Greenpeace við hesum stuntinum vísa sína ónøgd við virksemi hjá einum av heimsins størstu oljufeløgnum, Shell í tí arktiska økinum. Bygningurin, sum kvinnurnar hava klintrað upp í, er 310 metrar høgur og 72 hæddir. Veðrið er av tí besta í London og bretska pressan ger nógv burtur úr hesi sjáldsomu hending. Greenpeace sigur í einum skrivi, at tey hava savnað 3 milliónir undirskriftir at mótmæla boringum í Arktis. Shell sigur í eini viðmerking í morgun, at Shell hevur arbeitt í Arktis síðani byrjanina av 20. øld og hevur drúgvar royndir har. Felagið kennir stóra ábyrgd, tá tað arbeiðir í Arktis og ger alt tað er ment fyri at tryggja og verja umhvørvið. Shell, sum varð í ferð við at bora í Alaska í fjør, útsetti boringarnar orsakað av óhappum og tekniskum trupulleikum við boriskipi og er nú í ferð við at fyrireika seg til at bora í 2014.